FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Leiðslufundur 13. september 2016**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar : | Sigurð í Jákupsstovu, Hans Pauli Joensen, Turið Sigurðardóttir, Hans Andrias Sølvará og Jørgen Meitilberg |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 13. september 2016 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |

**Mál til støðutakan:**

**Mál til umrøðu:**

1. **Felags lestrarár**

Miðað verður eftir at allar útbúgvingar á Setrinum byrja í viku 34 í 2017. Dekanarnir taka málið upp til umrøðu á komandi deildarfundum.

2. **Felags ECTS**

Í samsvar við Bologna sáttmálan verður miðað í móti at lætta um flytføri hjá lesandi, soleiðis at ymiskar ECTS-støddir ikki forða lesandi í at taka fak uppá tvørs av deildum.
Tá ið nýggjar útbúgvingar verða settar á stovn á Setrinum, skal hetta havast í huga. Málið verður tikið uppaftur til nágreiniligari viðgerð á seinni leiðslufundum.

3. **Staðfesting av útbúgvingarleiðarauppgávuni – komandi trý árini**

Útbúgvingarleiðarar vórðu settir fyri trý ár í 2013. Dekanarnir taka málið upp við útbúgvingarleiðararnar.

4. **Innanhýsis, uttanhýsis ella blandaðir próvtøkuháttir**

Málið varð umrøtt.

5. **Próvdómarasamsýningar á deildunum**

Ósamsvar er millum samsýningarnar á FMD og NÁD. Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin endurskoða mannagongdirnar á økinum.

6. **Jólaborðhald anno 2016**

Í fjør varð avgerð tikin um at fyriskipan av jólaborðhaldinum gongur uppá skift millum deildirnar. SFD fyriskipar jólaborðhaldið í ár. Avgerð tikin um at jólaborðhaldið verður fríggjadagin 2. desember 2016.

/JM